HJÁLP YNSKIST
Hevur nakar funnið mína Nokia 3310 mobil, ið eg misti í Havn fríggjadagin 16. nov., so ring á
Tlf. 423592 – takk

Býli

YNSKIST
Kamar ella lítil íbúð ynskist til leigu í Havn til friðarligan, ungan drong. Vinarligast ring
Tlf. 332764

TIL LEIGU
Íbúð í friðarligum umhvørvi í Havn. Íbúðin er nútímans, bert 1 ára gomul og er innrættað soleiðis: durur, gongd, wc, 2 kømur, stova og køkur í einum. Boð undir 6.500 uttan el ongan áhuga. 3 mør. depositum.
Tlf. 315737 - 215737

LEIGA SUMMARHÚS
í Bjerregård/Hvide Sande (6 pers.). Tekur 2 1/2 t. at koyra til Hanstholm og 3 korter til Esbjerg. Prísur 1.600 kr. um vikuna í tíðini nov.-mai. Í húsunum eru nógvir hentleikar. Hoyr nærri á
Tlf. 250584

HÚS TIL LEIGU
Hús í miðbýnum í Havn (60 fermetrar) til leigu. Miðhædd: eitt »stórt« rúm. Loft: 2 kømur og baðirúm. Húsini eru eisini egnaði til skrivstovu.
Ring á telefon +45 27285004

ÍBÚÐ SØKIST
20 ára gomul kvinna við fastari inntøku søkir eftir lítlari íbúð í Havn, á Argjum ella í Hoyvík at leiga í eitt ár ella styttri.
Tlf. 314341

ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST
Íbúð/hús ynskist til leigu í Eysturoynni, helst í Runavík ella nærhendis.
Tlf. 449785 ella 255927

VERILSI/LÍTIL IBÚÐ
ynskist til leigu í Fuglafirði. Alt hevur áhuga.
Tlf. 250196

ÍBÚÐ SØKIST
Einlig 37 ára gomul kvinna søkir íbúð í Havn ella nærhendis.
Bill. mrk. 26-1

VERILSI TIL FRAMLEIGU
Verilsi í Hvidovre til framleigu frá 1/2-2002 til 1/8-2002. Tað er á einum kollegium, har tú hevur felags køk. Tað er sera gott samband við bussi inn til býin, bæði um dagin og um náttina. Leigan er ca. 1500,- um mánaðin. Nærri boð um verilsi og hentleikarnar á kollegiinum, kunnu tit fáa við at skriva mail til:
jt71fo@hotmail.com

KJALLARI Í SKOPUN
Kjallari í Skopun til leigu. Uppi í Gerðinum. Kann nýtast sum handil, goymsla, skrivstova, e.l. um áhugi er
tlf. (0045) 75141075/40288075

ÍBÚÐ Í BIRKERØD
3-verilsis íbúð, 70 kvm. til støddar við terassu, til framleigu í eitt ár frá 1. januar 2002. Friðaligt umhvørvi, og frástøða til København 25 min. við toki. Leiga kr. 6500 pr. mð.
Ring aftaná kl. 18 á tlf. 0045-45815627

EINLIG MAMMA
við 8 ára gomlum soni ynskir íbúð skjótast gjørligt. Eri at hitta á
tlf. 318562 ella 226287

TIL LEIGU
Til friðarlig og røkin fólk, er ovara hædd í húsum undir Varða í Havn, til leigu frá 01.12. Íbúðin, ið er ca. 90 kvm. hevur dur, gongd, 3 kømur, baðirúm, stovu, køk, hjall og vaskikjallara. Húsini liggja í sera friðarligum umhvørvi við blindveg, sera gott útsýn yvir Havnina. Dentur verður lagdur á at leigarin fer væl um, og leigumáli verður í eitt longri tíðarskeið. Boð undir 6.000,- uttan hita/el hava ongan áhuga. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
Bill.mrk. 1224-2

Dýr

YNSKIST
Hon undulátur ynskist til keyps. Fuglabúr hevur eisini áhuga.
Tlf. 313160 ella 223777

BORDER COLLIE HUNDUR
Fittur og blíður Border Collie hundur (14. mør.) verður latin fólki, ið hevur stundir at passa hann.
Tlf. 317114

TIL SØLU
6-kantað, 30 litrar akvarium við 5 slørhalum til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 217940

KÁLVAR TIL SØLU
Tveir tarvkálvar, 7 mør. gamlir, til sølu fyri 2.000 kr. hvør.
Tlf. 441519, e. kl. 19

STEGGJAR
Hevur onkur ein moskus-dunnusteggja og ein gásasteggja at selja mær?
Tlf. 373043

FÝRA HUNDAHVØLPAR
av lítlum slagi verða latnir djóravinum.
Tlf. 361332

TVÆR GÁSARBØGUR
til sølu.
Tlf. 422060

DVÆRGPAPEGØJER
Dværgpapegøjer sorthovede købes.
Tlf. 314434

KANIN TIL SØLU
Hey, eg eri ein fitt og kerlig hannkanin og mær tørvar eitt gott heim. Eg eri 1 ára gamal og eri gráur og hvítur. Eg vil bert vera hjá djóravini.
Tlf. 314161

Fundir

PENSIONISTAFELAGIÐ
í Havn kemur saman mikukvøldið 28. nov. kl. 19.00 í Losjuni, Tinghúsvegur 18. Hans J. Joensen, bispur, sigur frá. Teknað verður til jólaveitsluna hetta kvøldið.
Nevndin

HAGAFUNDUR
Ognarhagin á Mýrunum, Toftir, hevur hagafund í fundarhølunum hjá Nes Kommunu fríggjadagin 30. nov. kl. 19.00. Skrá: Val av orðstýrara. Val av hagastýri. Ymiskt.
Ognarhagin á Mýrunum

Húsarhaldstól

KOMFÝRUR TIL SØLU
Nýggjur óbrúktur komfýrur við fýra plátum, breidd 50 cm. Eisini er ein nýggj eymhetta til sølu. Alt til sølu fyri 4.600 kr.
Tlf. 310215

TIL SØLU
Ein dustsúgvari og ein Philips mikrobylgjuovnur, 50x41x39 cm.
Tlf. 213427

KOMFÝRUR
AGA komfýrur ella líknandi gamal ovnur ynskist til keyps.
Ring 254555 ella 317766 e. kl. 18

Innbúgv

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Dupultsong, amerikonsk, Queen size, 140 x 200 cm., við antikkum høvdalagi. Eisini lenistólur við skamli.
Tlf. 449192

TIL SØLU
Vegna flyting verður ein nýggj dupult sovisofa og eitt teak sofaborð (135x80 cm.) selt fyri 1.200 kr.
Tlf. 317114

TIL SØLU
Innbúgv av eini flottari og trivaligari eik dagligstovu til sølu vegna flyting. Masstiv, dreygað og útskorin, 3+1+1, sofaborð, 3 skáp á 82 cm. Kom og gev eitt boð.
Tlf. 310751

TIL SØLU
Lítið brúkt, blá sofa, ein hvítur kurvastólur og ein dupultsong við madrassum.
Tlf. 448679

TIL SØLU
Stór hornsofa (Chr.4-tal) til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 314123

TIL SØLU
Tvey skáp, ein hillaskipan og eitt sofaborð til sølu. Vælegnað til barnakamar og gestakamar.
Tlf. 447143

YNSKIST
Ein 2- ella 3-manssofa ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 258963, e. kl. 17

BRÚKTIR MØBLAR TIL SØLU
Hillasystem úr bókarviði, myrkabrúnt borð + stólar og chatol.
Tlf. 315911, e. kl. 17

TIL SØLU
Skrivaraborð, 140x70, 400 kr. Skuffusektión v/ trimum skuffum v/ lási.
Tlf. 220660 - 321915

YNSKIST
Brúnt teak stovuborð v/stólum, (ger onki um tað hevur kaklar), og sofaborð ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 361729, eftir kl. 18.00

TIL SØLU
Diskur við yvirskápi bíliga til sølu.
Tlf. 447796

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Ein høg furu song, 70x200 cm, v/ rusjubana og skrivaraborði, 800 kr.
Eitt køksborð úr bókarviði, 120x80 cm, v/ eyka plátu og 4 stólum, 800 kr.
Eitt myrkt reolsystem, 3 sektiónir á 110 cm hvør, 800 kr.
Eitt teak skrivaraborð, 500 kr.
9 spegl fýrkantar, 30x30 cm, 100 kr.
Eitt ovalt messing spegl, 80x60 cm, 400 kr.
Eitt runt akvarium v/ ljósi, til gullfiskar, 200 kr.
Tlf. 319440

TIL SØLU
Spísistovuborð og 6 stólar bíliga til sølu.
Tlf. 448965

Leikur

YNSKIST
Liggur tú inni við smáum Lego ella Brio tokbana, ið tú vilt sleppa av við, so ring til Eddu
Tlf. 319197 ella Eilin 226682

Lutaseðlar

LUTASEÐLAR FYRI
LEIRVÍKAR MISSIÓNSHÚS.
Vinnaranr. drigin á eydnuhjólinum 20. okt. 2001: 1) 2285, 2) 2190, 3) 640, 4) 2516, 5) 2560, 6) 1609.
Vinnarannir kunnu ringja á tlf. 443122. Vinningar mugu vera heint aðir innan 15. des., annars falla teir aftur til Missiónshúsið. Vit takka fyri stuðulin.
Leirvíkar Missiónshús

HAVNAR BÓLTFELAG
Freistin at gjalda fyri sølu av lutaseðlum er flutt frá 20. november til 15. desember. Drigið verður 27. desember.
HB

VINNARIN
av neytalortakappingini hjá B71 var teigur nr. 329. Ring tlf. 361641.
B71

Pløgg

TIL SØLU
Tvær hondbundnar mannfólkatroyggjur til før. búnan, onnur myrkablá, hin svart.
Tlf. 312156

LEVI'S 501 BUKSUR
Stødd: W35, L32, bert brúktar einaferð, til sølu.
Tlf. 447143

TIL SØLU
Óbrúktur 3/4 langur damujakki úr microfipur, v/ hettu, ið kann takast av, til sølu fyri hálvan pris.
Tlf. 313569, e. kl. 12

TIL SØLU
Svartur jakki og niðurdeilur, + blusa, std. 44, óbrúkt, til sølu fyri hálvan pris vegna serligar umstøður. Kann eisini seljast hvørt sær.
Tlf. 313569, e. kl. 12

LEVI'S 535
Nýggjar trompet buksur til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 316580

BRÚÐARKJÓLI
frá Bride Fashion, std. 36, til sølu.
Tlf. 322883 & 252665

TIL SØLU
Turriklæði og fyriklæði til føroysk klæði, std. 6 ár, ljóst/smáblomstrut, til sølu fyri 250 kr.
Tlf. 319310

TIL SØLU
Føroyskar húgvur til smádreingir hálvt til hálvtannað ár, til sølu fyri 150 kr. Bundar svartar/reyðar.
Tlf. 319310

Samband

SAMBAND YNSKIST
61 ára gomul, slank kvinna søkir samband við mann í hóskandi aldri. Eg eri akademikari og búgvi í Tórshavn. 100% tagnarskylda. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 527

SAMBAND YNSKIST
Eg eri ein ungdommilig einkja í 60-unum. Eg ynski at koma í samband við ein erligan og góðan mann, ið býr í Havn ella nærhendis, men Føroyar eru ikki so stórar, so tað kann vera líkamikið, hvar tú býr, bara tú ert edrúiligur og hampuligur. 100% tagnarskylda. Hevur hetta tín áhuga, so skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 22.11.

Sjavs

SJAVSKAPPING
verður í LÍF-húsinum hóskvøldið kl. 18.30.
LÍF

SJAVSKAPPING
verður í Felagslonini fríggjakvøldið 30. nov. kl. 19.00.
Eldrafelagið Borgin

Súkklur

KAPPSÚKKLA
til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 226220

TIL SØLU
Ein 16" dreingjasúkkla, 800 kr. Ein DBS damusúkkla v/ 3 gearum, 800 kr.
Tlf. 319440

Teldur

N64 SPØL
Zelda Majora's Mask, Zelda Ocarina of time, Bomber man 64 og Jetforce Gemini, til sølu fyri 250 kr. stk.
Tlf. 315062

NINTENDO 64
til sølu, við tveimum joystikkum, save-kort og fýra spøl. Marioparty, Pokomon snap, Bomberman 64, Super Mario 64.
Tlf. 313269

TIL SØLU
AMD 1,4 GHz, 512 MB-Ram, 40 GB harddisk, Nvida GeForce 2, MX 64 MB ram, 16 speed DVD / 48 speed CD-rom, 19" skerm, 120 watt hátalarar, mús og keyboard, til sølu fyri 12.900 kr.
Tlf. 315062

TELDA TIL SØLU
200 MHz, 48 MB ram, við modemi og 15" skermi, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 284142, e. kl. 18

TELDA
450 MHZ, 128 MB RAM, 20 GB HD ! (købt i sommer),16 MB Banshee grafikkort, 52 x CD-drev (helt nyt), CD-brænder, Netkort 15" skærm, højtalere, Windows ME, diverse programmer og rigtigt flotte spil. Pris 6.000 kr.
Tlf. 371843

TIL SØLU
FujitsuSiemens PIII telda. 500Mhz-20GBHD- 64Scsi MbRam- i56K v.92 Voice/fax modem- 17.4" skerm-Soundblaster PCI128 v/ Soundwave 80w hátalarum- Windows2000 Pro-Office2000 Premium- Norton Antivirus/Personal Firewall 2002-Neotracer 3Pro & Lexmark z11 ColorJet printari. Prísuppskot.: 6.500 kr.
Ring 226493 (Johan) e. kl.18

Tónleikur

TRUMMUSKINN
Nýtt sett av trummuskinnum verður selt fyri 600 kr. fyri øll. Av merkinum Tama. Støddir 12"-13" og 16" tamskinn, og 14" rútmuskinn.
Tlf. 224958

HYGG HER!
Eitt ROLAND EM-2000 keyboard til sølu fyri kr 11.000. Er bara 2 ára gamalt. Flightcase fylgir vi
Ring 211520

TIL SØLU
Ein góð, brúkt dupult pedal til sølu fyri 1.000 kr. Pedalin hevur møguleika at virka sum tvær einkultar pedalir.
Tlf. 224958

PUMPUORGUL
Eldri pumpuorgul, Joh. P. Andresen & Co., Ringkjøbing, til sølu.
Tlf. 424091

KEYBOARD TIL SØLU
Roland-E-35, Brastand + bonus - »kayse og sustain pedal«.
Tlf. 322909

TIL SØLU
Gamalt klaver, krevur ábøtur og skal stemmast, bíliga til sølu.
Tlf. 311105

Út- & Sjónvarp

DIGITALUR MÓTTAKARI
Ein Nokia mediemaster 96025 v/ tekst tv og telefon modemi + parabolhøvd til sølu fyri 2.700 kr.
Tlf. 226220

TIL SØLU
MSS 260 analogur parabol móttakari v/ skál og høvdi til sølu.
Tlf. 442169 - 281169

Ymiskt

EFTIRLÝSING
Er tað nakar, ið eigur sjónvarpsrøðina »Rødder« á bandi? Eg hevði verið fegin um eg kundi lánt hana.
Tlf. 224033 - 317332

YNSKIST
Vippivindeyga (liggivindeyga), std. uml. 69x138, ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 455139

DART
Stor open dart weekend.
Fredag d. 30.11. kl. 19.00: Damer (indledende).
Lørdag d. 1.12. kl. 11.30: Damer (semifinaler og finaler).
Lørdag d. 1.12. kl. 14.00: Herre-single.
Søndag d. 2.12. kl. 14.00: Herre-double.
Dartsamband Føroya. E-mail: dart@dartfo.dk
Hjemmeside: www.dartfo.dk

JÓLASØLA
verður í kjallaranum í Tilhaldinum í Tórsgøtu 21 frá 26.11.-30.11. kl. 14.00-17.00. Inngongd frá Grasagarði.
Tilhaldið

SUNDA PENSIONISTAFELAG
Jólaveitslan verður leygardagin 8. dec.kl. 17, í bygdahúsinum í Hósvík. Bussarnir koyra sum vanligt. Tilber at tekna seg hjá onkrum í nevndini innan 4. des. kostnaður 100 kr. Minnist til jólapakka.
Nevndin

MARKNAÐARDAGUR
verður í Ítróttarhøllini í Runavík 1. des. kl. 14.00 til 20.00. Tilmelding á tlf. 447655.
NSÍ

TIL SØLU
Nokia 8310 GSM fartelefon - nýggj fartelefon við FM radio. Tekniske specifikationer (frá www.nokia.dk http://www.nokia.dk). Kostnaður 4.500.-
Telefon. 212000

BOGI TIL SØLU
Lítið brúktur Hoyt Gold Medalist bogi (34/36 lbs.) við Easton A/C/E SS stabilisator/síðustabilisatorum, sikti, pílum, kufferti og nógvum øðrum tilhoyri til sølu.
Tlf. 320244 - 214910 (Høgni)

TIL SØLU
Tvær ljósar innhurðar, 200x73x3,6 cm, bíliga til sølu.
Tlf. 213427

NOKIA 450 NMT
fartelefon við 5 battarium og ladara til sølu fyri 1.800 kr.
Tlf. 227853

PENSJONISTAFELAGIÐ HUGNI
Klaksvík: »Hugni« hevur jólasølu av heimagjørdum lutum o.a. í Bøgøtu 3 fríggjadagin 30. nov. frá kl. 17.00–19.30. Kaffi verður eisini at fáa.
Nevndin

TIL SØLU
Dupult skolivask til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 319310

DRAGIHURÐ TIL SØLU
Hvít harmonikuhurð við rútum í til sølu fyri 800 kr. Er 207 cm høg og kann blívа upp til 120 cm breið, er í góðum standi.
Tlf. 315152

Lesið Sosialin

Lesið Sosialurin Sosialurin Sosialurin -tað loysir seg

HEILSANIR

Góða Rakul
Hjartaliga tillukku við 16 ára degnum. Eg elski teg.

Góði babba
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum, ið var 18. nov. Takk fyri alt tú ert fyri okkum.
Heilsan Jógvan Emil, Linda og Rebekka

Góðu Maibritt og babba
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum, Maibritt 26. og babba 28. Vit elska tykkum.
Heilsan mamma og Barbara

Góða Rakul
Hjartaliga tillukku bæði so og so.
Heilsan vit

Góði babba
Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum. Alt tað besta.
Heilsan Anna

Góði abbi, mamba og ba
Tillukku við døgunum. Eg komi skjótt at vitja tykkum.
Heilsan Anna

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**

Góða mamma og omma
Hjartaliga tillukku við degnum í dag. Takk fyri hugnaliga samveru í DK og hetta stuttliga ógloymandi kvøldið.
Ynskja hinar á myndini

Góða langabbadidd
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum, eg hopi, vit síggjast skjótt.
Heilsan Anna

Góða omma
Hjartaliga tillukku við 55 ára degnum. Harrin signi framtíð tína.
Heilsan Anna